# Veðrið

**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul av ymsum ættum, seinni veksur hann vindin upp í hvassan vind ella skrið av norði. Ælingur, partvís kavi og hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Hann minkar vindin niður í stívt andøvsgul av norði og útnyrðingi og sólglottar, men okkurt kavaælið. Hitalagið millum ÷2 og +1 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin kemur upp millum 5 og 8 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og yvirhøvur turt, men támut veður. Hitin millum 5 og 9 stig.



*Her er ein mynd frá 30-árunum. Tvey av børnunum hjá Wenzel Petersen, Elsa og Petur (Pade), sita her í einum lítlum opnum bili við galesju*



*Wenzel Petersen seldi tann fyrsta bilin, sum kom til Føroya, saman við Vilhelmi Nielsen. Júst Sivertsen og Hannus Olsen keyptu bilin*

# Føroya Ellisakfør gevur bilasøguna út í bók

*Virkna felagið, Føroya Ellisakfør, arbeiðir við at geva føroysku bilasøguna út í bók. Í hesum sambandi hevur felagið givið út faldara um virksemi felagsins*

JOHN JOHANNESSEN

Á limafundi í 1995 samtykti Føroya Elissakfør at fara undir verkætlan at geva føroysku bilasøguna út í bók. Ein søgubólkur varð settur at savna tilfar, og hevur hetta arbeiðið gingið støðugt framá síðani.

Ein partur av søguliga tilfarinum hevur longu verið at sæð í áhugaverda blaðnum hjá Føroya Ellisakførum, sum kemur út fýra ferðir um árið. Talan er um »Tíðindaskrivið Ellisakfør«, ið umframt søguliga tilfari eisini inniheldur frágreiðingar um virksemið í felagnum.

Limirnir í Føroya Ellisakførum siga seg vera sannførdar um, at føroyska bilasøgan er nógv meira áhugaverd enn vit hava givið okkum far um. Tað, ið serliga ger hana áhugaverda siga teir vera, at vit klára at fevna um alla bilsøguna, orsakað av, at vit eru eitt so lítið samfelag. Harafturat fevnir føroyska bilasøgan í tíð ikki meira enn um eina mansævi.

Men fyri at varðveita føroysku bilasøguna meta limirnir í Føroya Ellisakførum tað vera neyðugt at geva hana út í bók. Felagið sigur, at tað er fyri at varðveita ein stóran - og enn óskrivaðan part av føroyskum mentanini, at felagið ætlar sær at geva út bók um bilasøguna og tey fólk, sum hava havt tilknýti til bilstarvsgreinina fram til okkara dagar.

Tað krevur nógv arbeiðið og nógv heimildarfólk at geva út søguligt verk. Tí heitir Føroya Ellisakfør í faldaranum á einstaklingar og fyritøkur um at stuðla verkinum við at senda felagnum gott skrivligt tilfar og myndir.

Føroya Ellisakfør er eitt virkið felag við limum kring alt landið. Umframt at geva út bók við føroysku bilasøguni, arbeiðir felagið eisini í løtuni við áhugaverdari verkætlan um tøkniligt savn í gamla vatnbrunninum við Gráastein í Havn.




Lágtrýstið vestanfyri Ísland fer eystureftir og verður við Føroyar í morgin.




Lágtrýstið skamt í útsynning úr Føroyum fer í landsynning og hevur kalt høgættarák við sær.




**Hitalagið mált frá 10./01. kl 06⁰⁰–11./01. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,4°C**
Minsti hiti máldur í jan.: **÷8,8°** Mesti hiti máldur í jan.: **11,6°**




Avfallið: 6,0 mm – **mált frá 10./01. kl 6⁰⁰–11./01. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í januar: 93,3 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷22 |
| Nuuk | ÷15 |
| Qaqortoq | ÷12 |
| Ammassalik | ÷3 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 5 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannahavn | 4 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 2 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | ÷7 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 6 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 12 |
| Athen | 8 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 12 |
| Beijing | ÷4 |
| New Dehli | – |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | – |
| New York | – |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 31 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 25 |

**TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG**




**12. MAÐUR**
**Tlf. 213212**

## Vestfalskyrrindi

4. januar: Mánin longst frá jørðini
6. januar: Tendring
14. januar: Fyrra kvarter

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. jan. | 0942 | 2200 | 0842 | 2100 | 0857 | 2115 | 1142 | – | 0021 | 1242 | 0757 | 2015 | 0657 | 1915 | 0957 | 2215 | 1057 | 2315 | 0927 | 2145 | 1042 | 2300 |
| 13. jan. | 1020 | 2243 | 0920 | 2143 | 0935 | 2158 | 0000 | 1220 | 0100 | 1320 | 0835 | 2058 | 0735 | 1958 | 1035 | 2258 | 1135 | 2358 | 1005 | 2228 | 1120 | 2343 |
| 14. jan. | 1109 | 2340 | 1009 | 2240 | 1024 | 2255 | 0043 | 1309 | 0143 | 1409 | 0924 | 2155 | 0824 | 2055 | 1124 | 2355 | – | 1224 | 1054 | 2325 | – | 1209 |
| 15. jan. | – | 1215 | 1115 | 2357 | 1130 | – | 0140 | 1415 | 0240 | 1515 | 1030 | 2312 | 0930 | 2212 | – | 1230 | 0055 | 1330 | – | 1200 | 0040 | 1315 |